## Konsert í Vági við Ljómi

Allahalgannasunnudagin 4. nov. klokkan 18 fer Kirkjukórið Ljómur, undir leiðslu av Lars Mensonides, at hava árligu allahalganna konsertina saman við ymiskum solistum úr Suðuroyar Musikkskúla og næmingum hjá Súsonnu Brattaberg. Skráin er fjølbroytt við føroyskum, svenskum, enskum, týskum og latínskum sálmum og sangum. Hóast landsynning og lágætt, so fer kirkjufólkið aftur í ár, sum gamal siður er, innar í kór at offra til vælgerandi endamál, meðan »Nú hvítna tindar fjøllum á« verður sungin, skrivar Ljómur í tíðindaskrivi.



## Álit um endurvenjing

Mánadagin fer ein arbeiðsbólkur at handa landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum, Hans Paula Strøm, eitt álit um endurvenjing fyri fólk við førleikatarni. Í álitinum, sum verður almannakunngjørt á tíðindafundi mánadagin, verður millum annað staðfest, at ein endurvenjingarætlan hevði bøtt munandi um heilsuna og lívsdygdina hjá teimum umleið 5.000 føroyingunum, sum hava varandi sjúku, og teimum umleið 3.000 føroyingunum við hjarta- og æðrasjúkum. Harumframt høvdu millum onnur flestu krabbameinssjúklingar og teir 7.500 føroyingarnir, ið líða undir langtíðarfylgjum av giktasjúkum, havt gagn av endurvenjing, staðfestir bólkurin.

# Vit eru kynsliga misnýttar



**Eingin tosar um kynsligan ágang, tað verður bara fortrongt – bæði av samfelagnum sum heild og av tí einstaka barninum, sum verður misnýtt. Men Bára Joensen úr Gøtu og Rósalind Olsen úr Saltangará gera upp við føroysku tøgnina og fortelja um kynsligan ágang, fortronging og um at koma út í ljósið**

ÁGANGUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Tær kundu líka so væl verið innilæstar á sinnissjúkrahúsi, gingið sum alkoholiserað neyðardýr ella verið deyðar fyri egnari hond. Hetta siga 28 ára gamla Bára Joensen og 33 ára gamla Rósalind Olsen. Tað er ringt at ímynda sær, tá tær standa í ljósglæmuni í einum stúgvandi fullum Norðurlandahúsi. Livandi og tryggar fortelja tær um nakað, sum eingin fyrr í Føroyum hevur lagt bæði andlit og navn til alment.

Bára býr í Gøtu við manni og trimum børnum, og Rósalind, sum upprunaliga er av Sandi, býr í Saltangará við manni og tveimum børnum. Og sum vit seta okkum at práta, styrknar myndin av tveimum sterkum og lívsglaðum kvinnum. Men styrkin og lívsgleðin er ikki komin av sær sjálvum.

Sum lítlar gentur vóru tær báðar misbrúktar av monnum, sum tær høvdu álit á, og hesin ágangur var so ræðuligur, at tær fortrongdu hann. Ikki fyrr enn tær vórðu vaksnar og høvdu hús, mann og børn rann veruleikin fram fyri tær. Tær hildu, at tær høvdu havt ein vanligan barndóm, men uppdagaðu, at veruleikin var ein annar.

Fyri Rósalind kom skelkandi veruleikin um, hvussu pápi hennara misbrúkti hana, undan kavi, tá hon var upp á vegin við seinna barninum.

– Hevði eg ikki havt oyru, sum toldu og tordu at lurta, og tungur, sum tordu at spyrja, so hevði eg ikki klárað at liva við minnunum, sigur hon.

Bára er samd við henni. Hjá henni komu minnini sum eitt skot, tá maðurin eitt kvøldi kelaði hana um ryggin. Hon kláraði næstan ikki at fortelja manninum hvat tað var, og í fimm ár visti eingin annar nakað. Til endan brast bløðran tó, og hon var noydd at søkja sær hjálp og ráðgeving.

Í dag hava tær lært seg at liva við ræðuligu fortíðini, men leiðin hevur ikki verið løtt, og øll familjan hevur havt brúk fyri hjálp.

– Og hetta er nakað, sum vit skulu liva við restina av lívinum, og tí fara vit uttan iva at hava brúk fyri hjálp nakrar ferðir afturat, sigur Bára.

### Spøkilsi frá fortíðini

Lívið var gott, hon hevði barn, mann og eitt arbeiði, sum henni dámdi. Alt var púra normalt. Ella tað helt Rósalind í øllum førum. Fólk søgdu onkuntíð við hana, at hon inn í millum hevði ógvuslig øðisútbrot, men hesar hendingar mintist Rósalind ikki. Hon hevði havt ein vanligan barndóm, og hóast hon visti, at pápin ikki altíð dugdi at kenna mørk, so helt hon, at hann hevði verið ein góður pápi.

– Men tá eg gekk heima í samband við, at eg var upp á vegin, byrjaði alt at gerast óhugnaligt og møtimikið. Eg visti ikki, hvat tað var. Í fyrstuni var tað bara ein kensla, og eg misti alla orku. Bara tað at taka støðu til, hvat vit skuldu hava til døgurða, var sum at hyggja beint út av eini avgrund, greiðir Rósalind frá.

– Eg føldi alla tíðina, at onkur gekk aftan fyri meg, og at hendur krámaðu uppi á mær. Tá eg skuldi lata skápshurðar upp, mátti eg haldi hondina fyri bringuna fyri at verja meg, og tá eg fór í song, var tað sum um at løtan frá tí, at eg lat meg úr og var komin í náttklæðir, vardi ein ævinleika.

Og so byrjaðu myndir at koma fram fyri Rósalind. Í fyrstuni vóru tað bara skuggar, men so við og við, sá hon verulig fólk.

– Eg sá eina lítla gentu liggja í einari song, og ein maður lá uppi á henni og føldi upp á hana, og hann hevði eisini samlegu við hana. Og so byrjaði eg at kenna gentuna aftur og sá, at tað var eg. Og maðurin var pápi mín. Hetta var so óhugnaligt og anstyggiligt, at tað kann ikki lýsast við orðum, sigur Rósalind.

– Tað var sum ein ræðufilmur við mær sum høvuðspersóni, men tað var bara tað, at tað var ikki ein filmur, tað var veruleiki.

### Tøgnin og skommin

Bára var misbrúkt av abba sínum, sum búði í aðrari bygd, og eins og Rósalind var hon lítil, tá tað byrjaði.

– Tey fyrstu minnini, eg havi, eru frá áðrenn eg var farin í skúla, og tí rokni eg við, at tað byrjaði, tá eg var seks ára gomul. Hann hevði ikki samlegu við mær, men hann føldi uppá meg, og eg skuldi hyggja uppá hann, meðan hann nøktaði seg, greiðir Bára frá.

– Ágangurin fór fram, bæði tá eg var einsamøll saman við honum, og tá onnur vóru hjástødd. Hann dugdi so væl at kráma uppi á mær, uttan at nakar uppdagaði, og eg var bebbarødd og tordi ikki at siga frá, sigur Bára.

Tað bar ikki til at siga tað fyri nøkrum, tað bar ikki til at seta orð á tað. Einaferð hoyrdi Bára eina sending um kynsligan ágang í útvarpinum. Hon fór at gráta, og mamman spurdi, hvat feilti.

– Eg mundi sagt tað, men í staðin segði eg, at eg helt tað vera synd í teimum, sum sendingin var um. Eg kundi einki siga, tí um nú tey ikki trúðu mær, so hevði eg slett ongan.

Rósalind hevði tað á sama hátt.

Hon sigur, at kynsligi ágangurin var fulkomiliga skildur sundur frá gerandisdegnum, tí ágangurin var knýttur at so nógvari skomm, at hann ikki var til at liva við.

– Tá hann kom inn til